**FØRARI TIL BETONGPUMPUBIL**

Søkt verður eftir raskum manni at koyra betongpumpubil.
Arbeiðið er sjálvstøðugt og koyrt verður av blandistøðini á hjalla.
Tann, ið settur verður kemur at hava ábyrgdina av betongbilinum og skal vera røkin.
Byrjast kann beinanvegin ella eftir nærri avtalu.

J&K

P/F J & K Petersen · Tel 31 50 60 / Fax 58 50 01
e-mail JKP@JKP.FO

Sosialurin 341800



*Sufgittarin hjá Tórfinni Jákupsson kundi eins væl veri›tikin úr einum Tarrantino soundtracki, heldur ummælarin hjá musik.dk*

# Gestir fær jaligt ummæli í Danmark

**Danski ummælarin á musik.dk, gevur fløguni Burtur frá Toftunum hjá Gestum sera jaligt ummæli.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Á donsku tónleikaheimasíðuni musik.dk fáa føroysku Gestir fýra út av seks stjørnum fyri sína fyrstu fløgu, „Burtur frá Toftunum“.

Tónleikurin verður lýstur sum verandi føroyskur, bláur, larmuttur og vakur. Tónleikurin ljóðar sum ein romansa millum Jeff Buckley og Thom Yorke, leiddur av heilt serstøku røddini hjá Ólavi Jákupsson, og er ikki neyðugt at skilja orðini hjá Gestum - tú skilur tónleikin, undirstrikar ummælarin millum annað. Hann vísir á, at røddin hjá Ólavi Jákupsson av tí, at tú ikki skilur hana verður til eitt annað ljóðføri, men hetta er partur av tí, ið ger Gestir so góðar. Gittarspæli verður eisini tikið fram, og surf gittarin hjá Tórfinni Jákupsson, fær hugan at leita til eitt Quentin Tarantino soundtrack, skrivar ummælarin. Ið sigur, at røddin hjá Ólavi er imponerandi.

Fløgan hjá Gestum verður annars ummæld komandi viku í Søndagsavisen, ið kemur út í hvørt húsarhald í Danmark, og verður lisin av uml. 1,5 mió. lesarum, eins og í

september útgávuni av mannfólkablaðnum M! Magazine.

Ummæli liggur á: www.musik.dk/14072.

## Føroyskt framsýning í Trondheim

LISTAFRAMSÝNING

Sunnudagin 20. august lat upp stór framsýning á Trondheim Kunstmuseum, í Noregi.

Mentamálaráðharrin Jógvan á Lakjuni lat upp framsýningina, sum er tann fyrsta av sínum slagi í Noregi.

Listafólkini, sum hava málningar við á hesi framsýning, eru: Edward Fuglø, Sigrun Gunnarsdóttir, Astri Luihn, Torbjørn Olsen, Eyðun av Reyni og Ingálvur av Reyni.

Nógv fólk vóru til staðar, tá framsýningin lat upp sunnudagin. Somuleiðis vóru NRK-Sjónvarpið og fleiri dagbløð til staðar. NRK og norsku dagbløðini hava gjørt nógv burtur úr føroysku framsýningini í seinastuni, og ummælini hava verið góð.

Eisini sungu Petra & Hans Iversen fleiri Kingo/Peter Dass sálmar/sangir, tá ið framsýningin lat upp.

Sigast kann um Trondheim Kunstmuseum, at staðið er eitt tað størsta og týdningarmesta savnið í Noregi.

Føroyska framsýningin verður í Trondheim til og við 1. oktober 2006.

**BRÚKTAN JEEP**

Vit úvega sera góðar og bíligar, brúktar Jeepar úr Kanada



Ring og frætta nærri
STUBBIN
Fjarðarvegur 12 · Vestmanna
Tlf. 471 800
www.stubbin.fo
stubbin@stubbin.fo

**Summarhús**



Vit hava eitt av summarhúsunum til framsýnigar í Vestmanna

Sera vælútgjørt, 2 sovikømur, køkur við køliskápi/frystiboks, komfýri og eymhettu. Baðirúm við WC, vaski og stórari brúsukabinu. El, vatn v.m. Alt liðugt installerað.

**Prísur úr einans 187.500 v/mvg.**

Ring og frætta nærri
STUBBIN
Fjarðarvegur 12 · Vestmanna
Tlf. 471 800
www.stubbin.fo
stubbin@stubbin.fo

inni - trygt og ómaksleyst til hús



**Hotel Norð - Viðareiði**

Nú er stáðsiliga hotellið á Viðareiði til sølu. Bygningurin er í 2 hæddum – í alt 1100 fermetrar. Grundøkið er heilar 10.000 fermetrar. Byggiár 1975 / 1990. Í niðaru hædd er inngongd, stórt móttøkuhøli, mannfólka- og konufólkawc, fundarhøli til 30 fólk, barr, skrivstova, matstova til 190+90 fólk, líti veitsluhøli / uppihaldsstova til 25 fólk, køkur, grovkøkur, starvsfólkawc, goymslurúm og hjallur. Í ovaru hædd er stór trappuuppgongd, 15 dupultkømur við baðirúmi, minibar og sjónvarpi og lítil privatur køkur og vaskirúm. Hotellið stendur í avbera náttúruvøkrum og friðarligum umhvørvi og hevur sera gott útsýni. Fleiri upplýsingar fáast á www.hotelnord.fo og hjá INNI. Hotellið verður selt, um hóskandi boð fæst.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialu